## Húsvognar í hópatali

Vestmanna fekk eina sanna innrás av húsvognum fyrr í vikuni. Talan var um húsvognar, sum vóru ávegis til Íslands, men av tí at ferðaætlanin hjá Norrönu er sum hon er, er neyðugt at steðga í Føroyum ein dag ella tveir. Og hesa tíðina nýttu mongu ferðafólkini í húsvognunum at vitja Vestmanna.



# Norðurlendskur fundur um punktum fo

**Panoramaðið á Hotel Hafnia húsaði í gjár fimm norðurlendskum internet-myndugleikum. Ráðini hittast á hvørjum ári, og í gjár átti føroyska fo-ráðið tørn at vera vertur. .fo stendur sjálvandi fyri føroyska .fo landøkið, tað eru endabókstavirnir fyri allar føroyskar heimasíður og t-post adressur**

SAMSKIFTI
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Undir Vinnumálaráðnum er føroyski internet-myndugleikin .fo-ráðið, ið hevur ábyrgd av umseting og nýtslu av landøkinum .fo á internetinum. Ráðið er ein partur av árliga norðurlandsfundinum, fimm norðurlendskir internet-myndugleikar samskipa. Í ár var . fo-ráðið, og fundurin húsaðist á Hotel Hafnia.

Á hesum árliga fundinum samlast svensku, norsku, íslendsku, finsku og føroysku internet-myndugleikarnir, og hetta er fjórða árið, fundurin er hildin.

Ráðini eru óheft av hvørjum øðrum, men hittast fyri at skifta leiðbeining, hugskot og íblástur í millum sín. Hvørt land legði fram tað, sum er farið fram í virkinum tað seinasta árið, hvørjir trupulleikar hava verið, hvussu teir vórðu loystir. Ráðini kjakaðust síðan um ymiskar trupulleikar og spurningar, og hvussu teir verða loystir best. Ísak N. Jacobsen, formaður í .fo-ráðnum, greiðir frá, at londini hava ymiskar lóggávur, og tí ber ikki altíð til at at samanbera skipanirnar.

Brúkarar, ið nýta .fo landøkið, finnast ofta at prísunum á føroysku heimasíðunum, men Føroyar eru minni enn so dýrast í norðurlondum, greiðir Ingun Eiriksdóttir, limur, frá. Íslendska internetskipanin kann best samanberast við tann føroyska, og hesin er dýrari.

Ísland sær ongan íblást í føroysku internet-skipanini

Tá ið Sosialurin spurdi íslendska formannin, hvat hann helt vera jaligt og neiligt við føroysku skipanina, helt hann tað vera ov fløkjugt at skráseta eina føroyska heimasíðu og bað ráðnum ”loosin' up”.

- Ísland hevur verið íblásturin í føroyska internetvirkinum, har ein partur eisini verður rikin av íslendingum. Tískil síggi eg ikki serligan íblástur í skipanini hjá FO-ráðnum, greiðir íslendski formaðurin frá.

FO-ráðið leggur stóran dent á at verja brúkaran. Ísak greiðir frá, at nógvir falskir internetveitarar eru, ið snýta brúkararnar hjá øðrum veitarum, og tískil hevur eitt stórt evnið á fundinum verið, hvussu mann kann verja sínum brúkara best møguligt.

.fo landøkið hevur somu viðburð sum onnur norðurlond, greiðir føroyski formaðurin frá. Nøgd av brúkarum – almennum og privatum - er í mun til fólkatalið umleið á sama støði sum aðrastaðni.

Endamálið við fundinum er at samskifta okkara millum og varðveita og menna eina trygd og góðsku á einum internationalum støði, endar formaðurin.



*Internet-myndugleikarnir úr norðurlondunum, ið luttóku á norðurlandsfundinum*



*Tað hevur verið ein tungur burður, men leygardagin verða sølubásarnir í Vágsbotni alment tiknir í nýtslu*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

# Sølutorgið letur upp leygardagin

**Tað hevur tikið drúgva tíð, men nú lata sølubásarnir í Vágsbotni alment upp**

SØLUTORG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyrsta stigið at hugna um í Vágsbotni er nú tikið.

Nýggju sølubásarnir til fugl og fisk verða alment tiknir í nýtslu leygardagin, men longu fríggjadagin verður skipað fyri onkrum tiltaki í sambandi við, at sølubásarnir nú eru lidnir.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevur áður sagt, at hugnast skal um í Vágsbotni, millum annað við at seta borð, stólar og benkur upp við økið, har standmyndin av Nólsoyar Páll. Somuleiðis er eisini ætlanin at gera eitt torg millum Miðlahúsið og Gamla Reinsarí.

Borgarstjórin hevur fyrr víst á, at endalig støða um hetta verður tikin, tá sølubásarnir í Vágsbotni standa lidnir. Og tað gera teir alment leygardagin.